Landsbanki Føroya

FAROE ISLANDS GOVERNMENTAL BANK

# Ársfrágreiðing 2020



## INNIHALD

Fíggjarligt støðufesti í hásæti ..... 1
Nevnd ..... 1
Starvsfólk ..... 1
Landskassin bjálvaður ..... 1
Íløgurnar kastaðu av sær ..... 3
Skuld landskassans ..... 4
Kredittvirðið tað sama – Aa2 ..... 5
Hvør brúkar, hvør sparir, hvør lænir? ..... 5
Fíggjarviðurskifti Landsbankans ..... 6
Føroya Váðaráð og systemiskir váðar ..... 7
Framtíðarútlit ..... 8

## Fíggjarligt støðufesti í hásæti

Landsbankin virkar fyri fíggjarligum støðufesti og er fíggjarstovnur hjá landinum. Uppgáva Landsbankans er, umframt at umsita ogn og skuld landsins, at eygleiða og greina fíggjargeiran og búskapin sum heild, og gera vart við fíggjarligar váðar.

Landsbankin hevur fýra høvuðsendamál:

1) Virkar fyri fíggjarligum støðufesti í Føroyum
2) Røkir gjaldførið hjá landinum
3) Røkir skuldina hjá landinum
4) Kunnar politisku skipanina og almenningin

Harafturat er Landsbankin skrivstova hjá Føroya Váðaráði og umsitur Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og Búskapargrunnin. Sí løgtingslóg nr. 116 um Landsbanka Føroya og Føroya Váðaráð frá 24. november 2016.

### Nevnd

Sjey fólk sita í nevndini:

- Tummas T. Eliasen, formaður
- Jan Otto S. Holm, næstformaður
- Zvonko Mrdalo
- Elisabeth Eldevig
- Fróði Magnussen
- Mathea Hilduberg
- Edvard Heen

Nevndin hevur havt 13 fundir í 2020 Á hvørjum fundi verður hugt og fylgt við gjaldføri, avkasti og skuld hjá landskassanum. Nevndin hevur eisini javnan umrøtt eftirlit við ásetingum í lóggávu og kørmum – eitt nú eftirlit við minstagjaldførinum og íløgukørmunum. Nevndin viðger eisini altíð samfelagsgongdina og viðkomandi búskaparlig mál.

### Starvsfólk

Starvsøkið hjá landsbankanum kann býtast í tvey høvuðsøki: ein bankapart og ein greiningarpart. Bankaparturin arbeiðir við lántøku, skuld og gjaldføri hjá landskassanum, meðan greiningarparturin framleiðir, savnar saman, greinar hagtøl um føroyska fíggjargeiran og kunnar um týdningarmestu viðurskiftini, ið síggjast í hagtølunum.

Eitt starvsfólk er sett afturat í 2020, og bankin hevur nú sjey starvsfólk umframt stjóran. Umframt føstu starvsfólkini, brúkar Landsbankin eisini ráðgevar til avmarkaðar uppgávur, eitt nú greiningar og kunningartøkni.

Í løtuni er ein verkætlan í gongd at greina fíggjarpolitik í Føroyum, ein verkætlan er júst byrjað at gera eitt haldførismodel fyri Føroyar, og so er Landsbankin eisini við í eini verkætlan at skráseta øll býlir í Føroyum.

## Landskassin bjálvaður

Lógin um Landsbanka Føroya staðfestir, at landskassin skal hava 15 prosent av BTÚ í minstagjaldføri. Ásetingin kom beint eftir kreppuna í 90 árunum fyri at tryggja, at landskassin í kreppustøðum hevur tøkan pening at rinda lønir, pensjónir og aðrar útreiðslur við. Tiltaksgjaldførið er nóg stórt at rinda skyldurnar í seks mánaðar, hóast landskassin ongar inntøkur hevur.

Í 2020 skuldi landskassin soleiðis hava í minsta lagi 2,89 mia. kr. í gjaldføri.

### Gjaldføri landskassans

Stórur partur av hesum peningi er settur í virðisbrøv uttanlands. Landsbankin leggur eina gjaldførisætlan, soleiðis at landskassin fær eitt hóskandi avkast, tó við atliti til váðan.

Meginparturin verður settur í stats- og realkredittlánsbrøv (2,7 mia. í miðal), í altjóða partabrøv (647 mió. kr. í miðal) og nakað í kredittlánsbrøv (344 mió. kr. í miðal). Íløguheimildin hjá Landsbankanum liggur á heimasíðuni www.landsbankin.fo.[1]

Landsbankin veitir íløgurøktina út til fimm ymiskar norðurlendskar íløgurøktarar. Landsbankin umsitur eisini sjálvur eina íløgurøð við stats- og realkredittlánsbrøvum – hetta fyri at fáa neyðuga smidleikan í gjaldførið til raksturin hjá landinum. Ein lítil partur av gjaldførinum er eisini settur í alternativar íløgur, eitt nú í undirstøðukervi og mikrolán (í miðal 130 mió. kr.).

Av gjaldførinum hjá landskassanum liggja í miðal eini 170 mió. kr. í Føroyum – hetta er neyðuga upphæddin til dagliga raksturin. Restin er sett uttanlands fyri at spjaða váðan.

Tí verða føroysku peningastovnarnir ikki órógvaðir av, at landið tekur nógvar pengar út, tí peningurin stendur ikki á bók hjá teimum. Henda gjaldførisætlan er sostatt grundleggjandi fyri fíggjarliga støðufestið.

Mynd 1 vísir gongdina í gjaldførinum hjá landskassanum í 2020. Eisini sæst miðal gjaldførið fyri alt árið og minstagjaldførið (kravið á 15 prosent í gjaldføri av BTÚ). Sum myndin vísir er miðalupphæddin (reyð linja) væl omanfyri minstagjaldførið (blá linja).

Myndin vísur, at gjaldførið við ársbyrjan 2020 var um 600 mió. kr. omanfyri minstagjaldførið, men at tað fellur niður móti minstagjaldførinum, tá Covid-19 rakar.

Millum annað varð eitt av tiltøkunum hjá landsstýrinum at útseta MVG-gjaldið frá fyrsta ársfjórðingi til triðja ársfjórðing, fyri at lætta um gjaldførið hjá fyritøkum. Eisini var freistin at rinda tollgjøld longd. Av tí at óvissan um




*Mynd 1 – Gjaldføri hjá landskassanum 2020*

[1] Gamalt er, at øll egg ikki mugu leggjast í somu kurv. Soleiðis er eisini við virðisbrøvum – at best er at seta pengar í fleiri enn eitt slag av virðisbrævi. Ein íløgurøð er tí ofta sett saman við ymiskum sløgum av lánsbrøvum (obligatiónum) og partabrøvum. Samansetingin hevur týdning, tí oftast gongur væl við partabrøvum, tá ið illa gongur við lánsbrøvum, og øvugt. Á fakmálið eitur tað at samvariatiónin er negativ, ið merkir at tá tað eina gongur væl gongur hitt illa. Soleiðis verður váðin meira spjaddur.

inntøkur og útreiðslur landskassans var so stór í byrjanini av Covid-19 farsóttini, valdi løgtingið í juni 2020, tá landskassin kortini skuldi út at endurfíggja eitt lán, at læna 1,6 mia. kr. eyka. Lánið á 1,6 mia. kr. skuldi dekka hall á fíggjarlógini í 2020 og 2021, ið fíggjarmálaráðið tá metti at blíva ávikavist 1,1 mia. kr. og 500 mió. kr. Tí sæst stóra lopið á myndini. Samlaða lántøkan var 2,945 mió. kr., har 1,345 mió. kr. skuldi brúkast til at rinda skuld, sum fald til gjaldingar.

Síðani juni 2020 hevur gjaldføri landskassans ligið millum 4 og 5 mia. kr. Gjaldførið landskassans var við ársbyrjan umleið 600 mió. kr. yvir minstagjaldførið, við ársenda er gjaldførið 1,8 mia. kr. yvir minstagjaldførið. Gjaldføri av lántøkuni í juni 20 á tær 1,6 mia. kr., er tí enn tókt. Higartil, hevur landskassin enn bert trekt á yvirskotsgjaldførið, sum landskassin hevði við ársbyrjan.

## Íløgurnar kastaðu av sær

Talva 2 vísir árliga virðisbrævaavkastið hjá landskassanum síðani 2016. Avkastið var gott í 2016, 2017, 2019 og eisini í 2020 sæð í ljósinum av Covid-19. 2018 var fyrsta árið við negativum avkasti, síðani Landsbankin (Gjaldstovan 2013-2017) fór undir hetta virksemi. Her er týdningarmikið at vísa á, at virðisbrævakursir (partabrøv, lánsbrøv, kredittlánsbrøv v.m.) sveiggja hvønn dag. Hækkar kursurin, fær landskassin meira fyri virðisbrævið, um tað verður selt. Minkar kursurin, fær landskassin minni.

Talva 2 vísir avkastið av íløgurøktini fyri hvørt ár. Men fyri at meta um, hvørt ein íløgustrategi er góð, er rættari at hyggja at miðalavkastinum í einum fimm ára tíðarskeiði. Síðani 2016 hevur miðalavkastið verið 2,70 prosent ella 80 mió. kr. um árið.

| | Avkast % | Avkast mió. kr. |
|---|---:|---:|
| 2016 | 3,88 | 86 |
| 2017 | 2,81 | 82 |
| 2018 | -1,40 | -36 |
| 2019 | 6,30 | 191 |
| 2020 | 1,91 | 75 |
| **Miðal 2016-20** | **2,70** | **80** |

*Talva 2 – Avkast av gjaldføri hjá landskassanum síðan 2016*

Avkastið av íløgurøktini kann sveiggja frá einum ári til annað, og serliga var hetta sjónligt í 2018 og 2019. Tapið í 2018 varð longu vunnið inn aftur í januar 2019 og í 2019 góvu nærum øll sløg av virðisbrøvum positivt avkast og var samlaða avkastið heili 6,3%.

Í mars 2020 sá hinvegin ikki gott út við avkastinum orsakað av Covid-19. Tá ringast stóð til, hevði landskassin negativt avkast á 273 mió. kr. ella -7,8%. Kursirnir á partabrøvum fullu sera nógv, tí óvissan við Covid-19 farsóttini var so mikið stór. Íleggjarar seldu váðafúsu aktivini burturfrá (partabrøv), fyri at heldur at fara yvir í meira trygg aktiv, so sum statslánsbrøv og realkredittlánsbrøv. Árið endaði við positivum avkastið á 1,91% ella 75 mió. kr. Sum tíðin gekk, varð vitanin um Covid-19 betri, og flest øll lond vóru úti við stórum hjálparpakkum umframt at miðbankarnir føra sera lagaliga pengapolitik.

Endaliga avkastið í 2020 er eisini merkt av, at tær 1,6 mia. kr., sum tiknar vóru í láni í juni, standa tøkar at brúka, og tí ikki vera sett í onnur aktiv, eitt nú partabrøv, sum kundi givið hægri avkast.

Í Talva 3 sæst avkastið av ymsu virðisbrøvunum, sum Landsbankin hevur gjørt íløgur í. Størsta avkastið er komið av íløgum í partabrøv, meðan tey minnu váðafúsu virðisbrøvini, sum til dømis statslánsbrøv og realkredittlánsbrøv, hava givið lægri avkast.

Pengar, sum landskassin hevur standandi á bók í Føroyum til raksturin, hevur givið negativt avkast av tí at føroyskir peningastovnar, eins og útlendskir peningastovnar, hava givið negativa rentu fyri innistandandi í 2020.

| | Miðal íløga mió. kr. | Avkast mió kr. | Avkast % | Býtið % |
|---|---|---|---|---|
| Partabrøv | 647 | 68,9 | 10,7 | 16,6 |
| Statslánsbrøv | 40 | -0,1 | -0,2 | 1,0 |
| Realkredittlánsbrøv | 2.612 | 18,1 | 0,7 | 66,8 |
| Kredittlánsbrøv IG | 116 | 4,7 | 4,0 | 3,0 |
| Hárentulánsbrøv | 228 | -6,4 | -2,8 | 5,8 |
| Alternativar íløgur | 130 | -9,5 | -7,3 | 3,3 |
| Onnur fíggjaraktiv | 136 | -0,8 | -0,6 | 3,5 |
| **Íløgur tilsamans** | **3.909** | **74,9** | **1,9** | **100,0** |

*Talva 3 – Avkast av íløgurøðini hjá landskassanum í 2020, býtt á virðisbrævaløg.*[2]

Íløgurrøktin fyri landskassan varð boðin út í 2018. Fimm norðurlendskir peningastovnar hava fingið uppgávuna at røkja stóran part av íløgunum hjá landskassanum. Hesir eru Nordea, SEB, Handelsbanken, Nykredit og ein minni íløgurøð til Sydbank. Avtalurnar eru galdandi frá 1. januar 2019 og fyribils til endan av 2021.

## Skuld landskassans

Lánsbrævaskuldin hjá landskassanum var við árslok 2020 5,3 mia. kr. tilsamans. Skuldin hjá landskassanum er sett saman við fimm lánsbrævarøðum. Eitt skal rindast aftur í 2021, eitt í 2022 og eitt triðja í 2023. Harafturat er eitt 4-ára lán, ið skal rindast í 2025 og eitt 15-ára lán, ið skal rindast aftur í 2032. Øll lán eru standandi – tað vil siga, at bara renta (og ikki avdráttur) verður goldin í lánitíðini. Lániupphæddin verður goldin aftur í einum, tá ið lánitíðin er av.

*Mynd 2* vísir miðalrentuna við ársenda, sum landskassin rindar av lánsbrævaskuldini. Í 2020 rindaði landskassin í miðal 0,51% í rentu av sínum lánum, sum við ársenda vóru 5,3 mia. kr. Rentuúrreiðslurnar í krónum av lánsbrævaskuldini vóru 43,3 mió. kr.




*Mynd 2 – Lánsbrævaskuld: Miðal renta ultimo ár*

Rentan sum Føroyar rinda í sambandi við lántøku er nógv minkað seinastu 10 árini. Í 2011 var rentan á lánsbrævaskuldini í miðal 3,04%. Um rentan var á sama støði sum í 2011, høvdu rentuútreiðslurnar hjá landskassanum verið í miðal 133 mió. kr. hægri fyri núverandi skuld á 5,3 mia. kr.

Vanliga endurfíggjar/tekur landskassin lán á hvørjum ári. Eitt lán hjá landskassanum fall til gjaldingar í juni 2020. Lánið var á 1,345 mia. kr. Í juni 2020 tók landskassin tvey lán, eitt tvey ára lán á 1,3 mia. kr., her var effektiva rentan -0,08%. Harumframt eitt 5-ára lán á 1,645 mia. kr., við eini effektivari rentu á 0,185%. Samlaða lántøkan í 2020 var tí 2,945 mia. kr., harav 1,345 mia. kr., ið vóru nýttar at

[2] Pengar, sum landskassin hevur standandi á bók í Føroyum, verða brúktir til dagliga raksturin hjá landinum. Hesir eru ikki við í Talva 3.

rinda lán aftur við, meðan tær 1,6 mia. kr. er partur av gjaldføristilbúgvingini orsakað av Covid-19. Sum mynd 1 vísur, er gjaldføri landskassans gott, og væl omanfyri minstagjaldførið.

Næsta lán hjá landskassanum fellur til gjaldingar í juni 2021 og er 1,35 mia. kr. stórt. Tá er møguligt, at rindað verður niður av skuldini, tí mett verður, at hallið á fíggjarlógini í 2020 ikki er so stórt, sum mett varð, tá lántøkan varð framd í juni.

### Nettoskuld landskassans

Við ársbyrjan 2020 var lánsbrævaskuldin hjá landskassanum 3,7 mia. kr. Samstundis var gjaldførið hjá landskassanum 3,5 mia. kr.. Tað vil siga at nettoskuldin, t.e. skuld frátrekt gjaldføri, var 200 mió. kr. Við ársenda 2020 var lánsbrævaskuldin 5,3 mia. kr. meðan gjaldførið var 4,7 mia. kr., sum gevur eina nettoskuld á 600 mió. kr.

## Kredittvirðið tað sama – Aa2

Ratingstovnurin Moody's kreddittmetir Føroyar. Seinasta kredittmetingin er frá august 2020. Kredittmetingin var hóast Covid-19 tann sama, tað vil siga Aa2 við støðugum útlitum. Hetta er triðhægsta rating av 21 møguligum.

Fyri at víðka um íleggjaraskaran er ein rating neyðug, og jú betri kredittmeting, jú betri er rentan, tá ið landið skal taka lán. Kredittmetingin hjá landskassanum kann eisini brúkast sum útgangsstøði, tá ið fyritøkur og stovnar í Føroyum skulu taka lán í útlondunum.

Moody's vitjar vanliga Føroyar eina ferð um árið, men í 2020 vóru fundirnir umvegis alnótina. Allar frágreiðingarnar hjá Moody's um Føroyar liggja á heimasíðuni hjá Landsbankanum.

## Hvør brúkar, hvør sparir, hvør lænir?

Ein av høvuðsuppgávunum hjá Landsbankanum er at hyggja nágreiniliga at, hvussu nógvir pengar eru ymsastaðni í samfelagnum, eitt nú í bankum, hjá húsarhaldum og hjá fyritøkum. Eisini verður hugt at, hvussu kapitalur ferðast, hvør eigur til góðar, hvør skyldar, javnvág millum skuld og ogn.

Í 2020 gjørdi Landsbankin, umframt ársfrágreiðingina, eina frágreiðing um fíggjarliga støðufestið fyri 3. ársfjórðing 2020, og eina frágreiðing í trimum pørtum um ogn og skuld hjá føroyskum húskjum (desember 2020). Eisini arbeiddi landsbankin fram til mars 2020 nógv saman við danska váðaráðnum við frágreiðingini um kapitalkrøvini hjá bankunum. Í 2021 er ætlanin at koma við eini størri frágreiðing um fíggjarligt støðufesti í fyrsta ársfjórðingi og síðani hvønn ársfjórðing við styttri frágreiðingum.

Nógv orka er sett av til at fáa neyðug hagtøl til vega, sum kunnu brúkast til viðkomandi greiningar. Fyrst skal Landsbankin fáa tølini til vega frá øðrum stovnum. Landsbankin tryggjar síðani at tølini eru røtt, og reinsar upplýsingarnar, soleiðis, at tær eru sambæriligar. Serliga er tørvur á fíggjarhagtølum, sum kunnu lýsa fíggjarstøðuna hjá húsarhaldum, fyritøkum, og mótvegis útlandinum, ið enn ikki eru at finna hjá Hagstovuni. Í 2020 hevur bankin fingið fleiri hagtøl til vega um fíggjarstøðuna hjá húsarhaldunum, sum millum annað er lýst í frágreiðingunum um ogn og skuld. Nú verður arbeitt víðari við at fáa betri fíggjarhagtøl fyri fyritøkurnar og eisini hjá Føroyum mótvegis útlondum.

Fyri at taka samanum hevur Landsbankin í 2020 í greiningum og tíðindaskrivum millum annað víst á:

- At útlánsvøksturin hjá peningastovunum hevur í 2019 og 2020 verið minkandi og lágur (um 0%), tó at ein vend í gongdini hómast í útláninum í 3. ársfjóðringi í 2020, har vøksturin var øktur til 1%. Útlánsvøksturin frá donsku realkredittstovnunum til sethúsalán í Føroym, hevur tó verið stórur í 2020; 16% við árslok 2020.
- At innlandsyvirskotið í føroysku bankunum við endan av triðja ársfjórðingi var 5 mia. kr. Tað er í stóran mun húsarhaldini sum hava innlánsyvirskot (teirra innistandandi er størri enn teirra skuld til bankan), eisini tá teirra skuld til donsku realkredittstovnarnar verður trekt frá. Vinnan og kommunur hava hinvegin størri skuld í bankanum, enn innistandandi.
- Landsbankin hevur víst á, at landskassaskuldin er heldur stuttfreistað. Miðal lánitíðin hjá landskassanum er 2,6 ár, og hetta er væl styttri, samanborið við okkara grannalond. Við styttri lánitíð, gerst endurfíggingarváðin størri, meðan ein longri afturgjaldstíð er ein trygging ímóti ógvusligum rentuhækkingum á fíggjarlógini frá einum ári til annað. Hóast langfreistað lán eru dýrari, eru tey tryggari, tí við teimum er minni ivi um komandi lániútreiðslur. Minni ivi um komandi útreiðslur er sum útgangsstøði gott fyri fíggjarliga støðufesti.
- At føroyingar eiga líka stóra nettoogn sum danir og eitt vet minni enn íslendingar. Danir hava munandi hægri eftirlønaruppsparing, enn føroyingar, men føroyingar hava bæði lægri skuld og eiga sethús og bilar fyri hægri virði í miðal. Harafturat hava føroyingar í miðal meira pening standandi á bók. Nettoognin, sum er samlaða ognin minus skuld hjá føroysku húskjunum, er 5 ferðir tøku ársinntøkuna. Sama tal fyri danir er 5,2 og 5,5 hjá íslendingum
- At nominella miðalskuldin hjá føroyingum er økt gjøgnum árini. Í 2019 skyldaðu føroyingar, sum hava skuld, í miðal 570.000 kr. Í 1995 skyldaði hvør føroyingur, sum hevði skuld, í miðal 250.000 kr. Tað hongur millum annað saman við lækkandi rentustøðinum, ið hevur gjørt tað bíligari at læna samstundis sum at sethúsini eru økt í prísi.
- At fleiri fáa stór lán, tað vil siga hægri enn 3 mió. kr. Flestu húskir í Føroyum hava tó eina lága skuld: hjá 93% av húskjunum er skuldin lægri enn 3 ferðir samlaðu árligu inntøkuna. Lítið bendir tí í løtuni á, at húskini við høgum skuldarlutfalli (skuld í mun til inntøku hjá húskinum) eru ein váði fyri fíggjarliga støðufesti í Føroyum.
- At hóast nettoognin hjá føroyskum húskjum er økt, tykjast húskini ikki at hava økt nýtsluna seinastu árini. Síðani 2014 er virði á sethúsum økt munandi, og tað økir um frívirðið hjá húskjunum. Føroysk húskir hava lutfalsliga lága skuld í prosent av tøku inntøkuni samanborið við onnur lond, og hetta samsvarar við, at fægstu húskini ynskja at hækka nýtsluna gjøgnum økta skuld, hóast sethúsini eru økt í virði.

## Fíggjarviðurskifti Landsbankans

Landsbankin hevur nettojáttan á fíggjarlógini. Sambært lógini um landsbankan er játtanin 4 promillu av minstagjaldførinum. Tað svarar til 11,6 mió. kr. í 2020. Harafturat hevur Landsbankin inntøku av at umsita Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og somuleiðis eina minni inntøku av at umsita ogn hjá almennum grunnum. Tilsamans gav hetta eina inntøku á 2,4 mió. kr. í 2020. Samlaðu inntøkurnar eru 14,0 mió. kr.

Samlaðu útreiðslurnar hjá Landsbankanum vóru 8,6 mió. kr. í 2020, samanborið við 8,3 mió. kr. í 2019. Av teimum 8,6 mió. kr. vóru 6,5 mió. lønir (5,9 mió. kr. í 2019) og keyp av vørum og tænastum v.m. vóru 2,1 mió. kr. (2,3 mió. kr. í 2019) Keyp av vørum og tænastum er í stóran mun útreiðslur fyri KT, virðisbrævabókhald og aðra sakkøna hjálp, íroknað útreiðslur til Moody's.

Størsta útreiðslan hjá Landsbankanum er til lønir. Tað hevur í sambandi við menning av greiningarvirksemi bankans verið tørvur á at seta starvsfólk og harvið økja um lønarútreiðslurnar. Í 2020 er ein hækking á 0,6 mió. kr. samanborið við 2019. Eitt starvsfólk var sett afturat í 2020.

## Føroya Váðaráð og systemiskir váðar

Føroya Váðaráð hevur fýra fundir árliga og hevði seinasta fundin í desember 2020. Váðaráðið hevur til uppgávu, eins og Landsbankin – við støðið í greiningum – at eyðmerkja váðar. Meðan Landsbankin hyggur yvirskipað at váðum, hyggur Váðaráðið eftir *systemiskum* váðum.

Í 2019/20 hevur Føroya Váðaráð harumframt gjørt eina greining av kapitalkrøvunum til føroysku bankarnar í samstarvi við danska váðaráðið, har markvirðini, sum gera av, nær ein banki er SIFI-banki, eisini eru umrødd. Danska váðaráðið – Det Systemiske Risikoråd – almannakunngjørdi greiningina í fyrsta ársfjórðingi 2020, og hon sæst á www.landsbankin.fo.

Føroya Váðaráð er skipað við 5 limum. Limir í Føroya Váðaráðið eru:

- Malan Johansen, landsbankastjóri, forkvinna.
- Jesper Rangvid, professari, CBS.
- Bjørn R. Gudmundsson, skrivstovustjóri, Hagstofa Íslands.
- Jógvan Thomsen, stjóri Vinnustovnurin.
- Bjarni Askham Bjarnason, aðalstjóri, Fíggjarmálaráðið.

Váðaráðið sendir út tíðindaskriv eftir hvønn fund, sum greiðir frá umrøddu evnunum. Tíðindaskrivini liggja á heimasíðuni www.landsbankin.fo.

Váðaráðið vísti í 2020 millum annað á:

- At eingin greið tekin eru um at systemiskir váðar eru í umbúna í føroyska bankagreiranum.
- At útlánsvøksturin í bankageiranum er lágur, serliga tá samanborið verður við vøksturin í BTÚ.
- At líkt er til, at negativar rentur fyri at hava pening á bók, gera at vinna og húsarhald í størri mun rinda skuld niður.
- At Covid-19 farsóttin heldur hevur verið ein negativur stoytur fyri búskapin, enn ein verulig kreppa, samanborið við onnur lond.
- Saman við danska váðaráðnum, at kapitalkrøvini til føroyskar peningastovnar eru hóskandi. Umframt kapitalkrøvini, er krav til NEP-kapital. NEP-kapitalur skal nýtast til at endurreisa ein peningastovn, um hesin kemur í fíggjarligar trupulleikar. Danska váðaráðið fer árliga at meta um, hvørt NEP-kravið til føroysku SIFI-bankarnar hevur neiliga ávirkan á realbúskapin. Um so er, er danska váðaráðið sinnað, at mæla til at leingja freistina fyri nær føroysku bankarnir skulu lúka NEP-kravið (sum í løtuni er 1. juli 2025).
- At Norðoya Sparikassi ikki longur verður SIFI-banki, tí eitt markvirðið um støddina av javnanum er komið afturat. Fyri at vera SIFI-banki, skal javnin vera í minsta lagi 3.

mia. kr.. Hetta verður galdandi frá um miðjan 2021.

- At hækkingin av systemiska buffaranum frá 2% til 3% fyribils varð útsett, í fyrsta umfarið til 1. januar 2021. Seinni er avgjørt, at tað í fyrsta lagið verður tikið avgerð um, nær systemiski buffarin skal hækka til 3% í 2021, og tá hækkingin verður framd, verður hon varslað við 12 mánaðum. Hetta varð gjørt orsakað av Covid-19. Í mars 2020 gav hetta føroysku bankunum 123 mió. kr. í lægri kapitalkrøvum, sum gevur bankunum møguleika at veksa um teirra útlán við umleið 1,4 mia. kr.

## Framtíðarútlit

Covid-19 hevur skakað heimin í 2020, men nú sær eitt vet ljósari út, hóast nógv lond enn eru latin aftur. Flestu londini eru síðst í desember byrjað at koppseta fólk og fara so við og við lata samfelagið upp aftur, og tá er sannlíkt at búskapurin byrjar at virka sum teir plaga. Samstundis sum tað hendir, vilja lond givið minka fíggjarliga stuðulin, tey hava veit vinnu og húsarhaldum. Stóru hjálparpakkarnir, sum eru veittir skulu fíggjast. Í fyrstu atløgu er tað gjørt við at hækka skuldina, men í seinni atløgu merkir tað hægri skattabyrðu í londunum.

Heimsbankin metir, at heimsbúskapurin fer at veksa við 4% í 2021, um koppsetingin fer at eydnast. Forsøgnin er tó óviss.

Líkt er til, at føroyski búskapurin er sloppin væl frá Covid-19 farsóttini higartil. Eitt nú vísa hagtølini fyri løntakaratalið og arbeiðsloysið, at føroyski búskapurin hevur megnað at fótað sær lutfalsliga skjótt.

Landskassin hevur veitt hjálparpakkar, men langt frá í so stóran mun, sum í granna-londunum. Serliga hjálparpakkin við lønarískoyti var ein góð hjálp fyri húsarhaldini. Føroysku peningastovnarnir hava eisini bjóðað avdráttarskáa og eyka gjaldførishjálp til bæði húsarhald og vinnu, men avdráttarskai er ikki nýttur í merkis-verdan mun. Uppgongutíðirnar síðstu mongu árini hava gjørt, at vinnulívið er væl konsoliderað og somuleiðis landskassin og kommmunukassarnir. Føroyski búskapurin var tí væl fyri, eins og hini norðanlondini, at taka ímóti einum tílíkum stoyti, sum Covid-19.

Covid-19 farsóttin er ikki av enn. Øktar fiskagoymslur og óvissan, ið framvegis er av Covid-19 kann gera, at minni fæst fyri útflutningsvørur Føroya í 2021. Tað kann føra við sær minni yvirskot í fiski- og alivinnuni í ár. Men at inntøkurnar sveiggja er ikki ókent fyri fyritøkurnar í hesi vinnuni. Eisini eru hesar vinnur frammanundan væl fyri, til at kunna fóta sær. Ferðavinnan, tað vil siga flutningur bæði luft- og sjóvegis, hotell og matstovur, mentan við meira, er hart rakt av fylgjunum av Covid 19 og kemur eisini 2021 at merkja farsóttina.